## DAGSINS MEINING

# Tiltøkini munaðu

Tá stríðið um allan tann demokratiska heimin móti apartheid í Suðurafrika og harðræði aphartheidstýrisins í Namibia var uppá tað harðasta, bar hetta stríðið eisini við í Føroyum. Tilvitandi einstaklingar, friðarrørsla, fakfeløg og flestu politisku flokkar stuðlaðu demokratisku kreftunum í Suðurafrika. Hesin stuðul var mest av moralskum slag við yvirlýsingum og tiltøkum.

Spurningurin um støðu Føroya til apartheidstýrið gjørdist av álvara til eitt politiskt mál, tá løgtingið eftir áheitan frá donsku stjórnini skuldi samtykkja boykott móti Suðurafrika. Málið var liður í heimsumfevnandi ST- tiltaki við tí endamáli at fáa fólkaræðilig viðurskifti at galda í Suðurafrika. Aðalmálið var sum øllum kunnugt í hesum høpi at fáa apartheid í Suðurafrika tikið av og at fría Namibia frá tí yvirvaldi, sum Suðurafrika við órøttum hevði tikið sær yvir hesum fyrrverandi týska hjálandi.

Sum fólk ivaleyst minnast gekk ikki heilt, sum myndugleikarnir í Danmark og í Føroyum høvdu ætlað við hesum máli. Ein flokkur var ímóti, aðrir vóru ivandi, ein ávísur føroyskur fólkatingsmaður tók upp politiskt samband við apartheidstýrið og føroyskir reiðarar sendu skip til Namibia. Úrslitið gjørdist, at Føroyar vóru einasta land í Vesturheiminum, sum aktivt royndi at menna búskaparliga sambandið við apartheidstýrið.

Men so ein dag vendi rákið, og meiriluti fekst á tingi fyri altjóða boykottinum. Vit komu við og boykottlóggávan varð samtykt. Í tí mangan heita orðadráttinum um boykottið vildu tey, ið vóru ímóti boykotti vera við, at boykott gjørdi meira skaða enn gagn. Hetta var ikki rætt. Tað vistu vit tá og tað hava vit fingið vissu fyri seinni eitt nú, tá suðurafrikanski sendiharrin í Danmark Steve Gawe var og vitjaði í Føroyum. Steve rósti og takkaði teimum, sum stuðlaðu boykottinum og gjørdi vart við, at hetta gjørdi útslagið. Suðurafrika gongur nú við risafetum móti meira fólkakræði og búskaparligari menning. Hetta er sjálvsagt fyrst og fremst takkað verið ANC og tess klóka politikki, ið byggir á sátt og semju. Men hetta hevði í dag ikki verið møguligt uttan altjóða samhaldsfesti við boykotti og politiskum og moralskum stuðli. Víst gjørdu tiltøkini mun.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er neyðugt við so mongum ósemjum

**Jógvan við Keldu**



Tøkniligar forkanningar geva av sær sjálvum ikki loyvi til at seta í verk byggi- ella umvælingararbeiði í samband við SSSB-FAR. - Heimurin broytist skjótt, hóast Tjóðveldisflokkurin setur seg ímóti. Eg heiti á løgmann um sum skjótast at fáa eitt aðalorðaskifti í lag.

Tað skal ávíst tolsemi til fyri at vera í samvinnu við flokk, ið bert hevur tvinnar dimensiónir á ávísum økjum, ein flokk ið ávíkavist bert sær svart og hvítt ella talan er um ja og nei. Trongskygni, er ikki at síggja aðrar nuansur.

Har politikarar eru, er nógv prát, har nógv prát er, finnast ofta ósemjur og har ósemjur eru, fylkjast fjølmiðlafólk, sum fuglur yvir seiðatorvu.

**Einki umvælingar- ella byggiarbeiði**

Uttanlandsnevndin viðgjørdi fyri fáum døgum síðani skriv frá Løgmanni, sum hevur fingið fyrispurning frá donskum myndugleikum um loyvi til at gera tøkniligar forkanningar fyri at fáa greiði á, um ætlanin í samband við SSSB "Ship Shore Ship Buffer, Faroes" kann setast í verk á staðnum.

Tá úrslitini av hesum kanningum eru fingnar, verður endalig avgerð tikin, um SSSB-FAR verkætlanin yvirhøvur verður sett í verk.

Talan er ikki um at seta nakað byggiarbeiði í verk, men bert nakrar forkanningar, so vitast kann, um nakað yvirhøvur skal ella kann gerast.

Av teirri orsøk, at málið skal aftur í tingið, um byggi- ella viðlíkahaldsarbeiði skal setast í verk, vóru Fólkafloksumboðini samd um, ongar viðmerkingar at gera til hetta. Tað vil í hesum førum siga, at vit góðtaka at forkanningarnar verður framdar.

Hetta brýtur ikki við nakra samtykt um, at áðrenn vit siga ja til útbyggingar, eigur aðalorðaskifti at vera um hernaðarviðurskiftini í tinginum. Um tað so klárleggur viðurskiftini nakað betur, fáa vit at síggja.

**Vinstravongurin í Íslandi ørkymlaður**

Tá eg hugsi um Tjóðveldisflokkin, um teirra "víðfevnda svart/hvíta og nei/ja politikk", kemur mær í hug vinstravendu íslendsku vinaflokkar teirra.

Eftir krígslok hava hesir nýtt hvørt høvið til, tá samkomur hava verið av ymiskum slagi úti ella inni, at standa við stórum skeltum og "rimmar" hátalarum: "Út við NATO" ella "út við amerikumonnum".

Nú amerikumenn av álvara hava hug at ríma úr Íslandi, standa hesir somu vinstra-vendu politkarar – sjálvandi nøkur ár eldri – ørkymlaðir, tí "soleiðis kunnu amerkiku-menn ikki fara av landinum, eisini tí amerikumenn hava latið rættiliga nógvan pening frá sær í íslendskar kassar umframt at vera ein trygg verja".

Heimurin broytist alt skjótari, sjálvt um Tjóðveldisflokkurin ger seg ómøguligan, og vit síggja eisini í dag, at londini eystanfyri, sum NATO varð stovnað fyri at verja okkum ímóti, nú brádliga eru NATO-lond.

**Latið okkum stuðla**

Tað var fyrrverandi bretski forsætisráðharrin John Major, sum nú ein dagin segði í einum"Talk Show" í BBC, at "vit skulu ansað eftir, nú ES hevur í kvittan at gera eina serstaka verjusamgongu, har Frakland og Týskaland eru á odda, at vit ikki undirgrava NATO-felagsskapin, sum hevur og fer at tryggja heimsfriðin betur enn nakar annar.

Latið okkum ikki sum samgonga – eins og Tjóðveldisflokkurin - í berum treiskni sita hendur í favn og bara mótmæla øllum, tí vit eru ræddir fyri at taka støðu.

Sjálvandi skulu vit geva loyvi til hesar tøkniligu forkanningarnar, sjálvandi skulu vit vera við í samráðingum við NATO verjuskipanina uttan at verða ræddir fyri framman- undan, at verða "tiknir á bóli".

**Fýra løgtingssamtyktir**

Við løgtingssamtyktini 13. apríl 1940 vóru bretar í Føroyum. Hetta var ein serstøk støða. Sjálvandi hevði føroyingurin sína meining, men "Føroyar vórðu á ein hátt drignar inn í ósemjuna landana millum", um vit vildu tað ella ikki.

Í 1960 – 12. mai - varð aftur sent mótmæli um, "at hermenn verða knýttir at Sornfellis- ella Eiðisstøðini og noktað fyri, at krígsútgerð verður goymd ella nýtt á føroyskum land- ella sjóøki".

Aftur 1970 mótmælti Føroya løgting og vísti til løgtingsviðtøku frá 13. apríl 1940.

Í 1984 var samtykt at "lýsa Føroyar at vera kjarnorkufrítt øki".

Vit hava tí sanniliga nógv at tosa við donsku stjórnina og NATO um.

Eg fari tí at heita á Løgmann um sum skjótast at leggja fyri tingið málið til aðalorðaskifti um framtíðarstøðu Føroya á verjupolitiska økinum, soleiðis at vit hava møguleikar at koma víðari á leiðini.

# Spurningur til Føroya Javnaðarflokk

**Zakarias Wang**



Í bløðunum hevði javnaðarflokkurin herfyri eina grein um tjóðskaparliga semju í sjálvstýrismálinum.

Har verður sagt, at "ein komandi føroysk stjórnarlóg skal taka støði í teim galdandi ríkisrættarligu viðurskiftunum."

Vil hetta siga, at Føroya Javnaðarflokkur í fleiri ár hevur tikið lut í arbeiðinum í grundlógarnevndini uttan at kravt, at nevndin fyrst av øllum finnur út av, hvør støða Føroya er í tí fólkarættarligu eind, sum vit eru ein partur av?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Sosialurin, Javnaðarflokkurin og fullveldissannleikin

**Áki Andreasen**



Javnaðarflokkurin hevur seinastu nógvu árini hann hevur siti í andstøðu, eftir at hava sett seg sjálvan uttanfyri politiska ávirkan, við sínum stirvna afturhaldspolitikki, valt at taka ymiskt til sín og samtíðis gera seg til eitt slag av umboðsflokki fyri tað sum nú einaferð hevur verið frammi.

Øll verkføllini sum hava verið, hevur flokkurin roynt at malt eina politiska kaku burturúr, øll minnast tá Javnaðarflokkurin var talirør hjá Poul Nyrup, meðan fullveldissamráðingarnar vóru, undir fíggjarlógarviðgerðini gjørdi flokkurin so til eitt slag av "arbeiðsgevaraflokki" og lætst taka so hjartaliga synd í vinnuni í Føroyum, og sum rosinan í pylsuendanum vil Javnaðarflokkurin gera seg til talsmann fyri tað sum Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi hevur kanna viðv. ST og frælsisstríðnum hjá ófrælsum londum sum Føroyar - jú javnaðarhestarnir eru fleiri.

**Tjóðveldisflokkurin trygdin fyri fullveldisgongdini**

Oddagreinin í Sosialinum fríggjadagin 17/10/2003 setur spurnaðartekin við hvat vit í Føroyum hava verið vitni til seinastu seks árini á fullveldisøkinum…..

Hóast at tað skuldi verið eyðsæð eftirhondini hvussu samgongan við Tjóðveldisflokkinum á odda hevur roynt at fingið greitt viðurskiftini millum Føroyar og Danmark; fyrst við samráðingum, tá samgongan við opnum sinnið fór til Danmarkar fyri at fáa eina semju við stjórnina. Samgongan hevur ongantíð lagt seg eftir ósemjum ella samanbrestum, sum andstøðan í Føroyum tíðliga og síla vildi gera tað til - og tey sum hava fylgt eitt sindur við vita hetta, men kortini vil Sosialurin og Javnaðarflokkurin kalla hetta "eina blindgøtu" og "fullveldisætlanir á skeivum grundarlagið" o.s.fr.

Veruleikin er tann at Tjóðveldisflokkurin í undanfarna valskeiðinum saman við samgonguni hevði greiðar ætlanir, sum høvdu borið á mál um, andstøðan - Javnaðarflokkurin undir veingjabreiði Sambandsfloksins ikki fóru í baklás og gjørdi seg til ørindaflokkar hjá donsku stjórnini og um stjórnin vildi loysnir sum søma seg einum framkomnum demokratiskum samfelag.

Tað hevði ikki verið nakað sum forðaði fyri at fingið eygleiðara, um danir vóru samdir við Tjóðveldisflokkin og samgonguni um hetta - men ikki ein gang tað bar til. Hetta er veruleikin um tær ætlanirnar, sum Føroya fólk m.a var vitni til.

Síðan valdi Tjóðveldisflokkurin og samgongan at snikka eina ætlan til í Føroyum, og tað er hesi ætlan sum Tjóðveldisflokkurin er borganin fyri, og sum er tilverugrundarlagið fyri sitandi samgongu.

**Tjóðveldisflokkurin er faðir at øllum yvirtøkum**

At oddagreinskrivarin í Sosialinum ósmæðið gevur Javnaðarflokkinum heiðurin av yvirtøkuni av Postverkið Føroya, 200 fjórðinga markinum, umsitingina av skúlaverkinum - tað er at fyrigykla Føroya fólki nakað, sum ikki er í tráð við veruleikan. Møguliga hevði Javnaðarflokkurin samgongu- leiðsluna, men Tjóðveldisflokkurin setti krøvini fram, helt fast við tey og fekk tey framd, tað er veruleikin.

Tjóðveldisflokkurin hevur ongantíð "fagurmálað" veruleikan, hvørki í undanfarna ella hesum valskeiðinum. Ræðumyndirnar frá afturhaldinum hevur harafturímóti verið kjølfesti í andstøðupolitikkinum í Føroyum - og tá henda svarta samfelagsmálingin hjá sambandsflokkunum, má veruleikin tykjast bjartur og ljósur - og framtíðin somuleiðis!!

Fullveldisstríði heldur fram, og nógv er komið á skaftið, niðurskurðurin av blokkinum var eitt frambrot, allar tær fyrireikingar sum eru gjørda og sum vera gjørdar eru eitt frambrot, umframt tær yvirtøkur sum eru gjørdar - tað er veruleikin.

Tjóðveldisflokkurin ferð áhaldandi at arbeiða og stríðast fullveldisstríð føroyinga, tað hevur verið og ferð framhaldandi at eyðkenna arbeiði Tjóðveldisfloksins.

**Eyðkendi trupulleikin hjá Javnaðarflokkinum**

Tað er ilt at siga hvat Javnaðarflokkurin vil við framtíðini, men tekin eru um at hann roynir av øllum alvi gera seg leysan av "samanvøkstrinum" við Sambandsflokkin.

Tað eru av álvara partar í Javnaðarflokkinum sum ikki vilja ganga oyðimarkargongdina longur; bæði í ríkisspurninginum, vinnupolitikkinum, vælferðarpolitikkinum, mentanarpolitikkinum og eg kundi hildið fram.

Í fíggjarlógarviðgerðini fór øll orkan hjá Javnaðarflokkinum at finnast at - uttan at vísa á nakað ítøkiligt, tingfólk floksins løgdu einkisigandi tvætl fyri dagin um myrka sjokulátu og mannminkandi samanberingar; og hetta er vorðið spjaldrið sum flokkurin hevur hongt um hálsin á sær sjálvum.

Tað er í øllum førum ikki ein gongd leið at halda á at snara og snúrað veruleikanum; hvørki tá talan er um fullveldisgongdina, um hvør setti hvønn uttanfyri politiska ávirkan - tí Javnaðarflokkurin hevur havt eina rúgvu av møguleikum at fáa ávirkan - men flokkurin hevur ikki vilja, men hevur heldur valt at verða undir liðini á Sambandsflokkinum, og koma við hóttanum um at taka seg úr grundlógarnevndini, og annars verið í sambandskórinum hjá Lisbeth Petersen.

Tíðirnar broytast - og tillagingar skulu til, men eitt broytist ikki - og tað er sjálvsstýriðsstríði, sum Tjóðveldisflokkurin hevur borga fyri, tí í hjørtum okkara býr frælsi.

# Høvuðsinnkoyringin til Havnina -Ytri Ringvegur

## »80 km/t vegur«

Í bløðunum hava vit lisið ymist um nýggjan innkoyringarveg til Havnina.

**Í Dimmu 01-10-03 boðar Bjarni Djurholm** m.a. frá, at fyrsta stig av hesi vegagerð er boðið út í almennari lisitatión, og nevnir somuleiðis at Javnaðarflokurin hevur lagt uppskot til samtyktar, um at kanna hesa upprunaligu ætlan av nýggjum.

*(Og **Oyggjatíðindi** fær óføra nógv burtur úr hesum uppskoti 17-01-03).*

**80- árini**

Málið byrjar miðskeiðis í 80-árunum, við ætlanini at gera tunnil úr Kollafirði í Kalbaksbotn. Hesin fyri bert fáum árum síðani heilt ótrúligi bati í ferðing millum Norður- og Suðurstreymoy, fór samstundis at "kollvelta" høvuðsinnkoyringina til Havnina, sum í einum fór at verða flutt av Oyggjarvegnum og oman á Hvítanesvegin.

Í hesum sambandi ger Landsverkfrøðingurin tá umrødda upskot um "Nýggjan innkoyringarveg til Havnina", sum av Hvítanesleiðini skal fara gjøgnum Hoyvíkshagan, renna fram við "Kettuurðini" undir Húsareyni og haðan koma í Oyggjarvegin, á leiðini undir "Krákugjógv".

Á leiðini oman í Oyggjarvegin sker ætlaði nýggi innkoyringarvegurin seg ígjøgnum gomlu traðirnar oman fyri Villingardalsvegin.

Hetta hildu fólk, sum búleikaðust á traðunum tá, sum vera man, vera stóran - og heilt óneyðugan miss fyri seg og eftirkomarar, og harafturat óneyðugt spill av stórum, virðismiklum og veðurgóðum lendi, sum fór at verða til gagns fyri Býin sum heild í komandi árum.

Við brævi dagf. 05-11-1988 heitir Bjørn á Heygum, advokatur vegna eigarnar: Ásbjørn Poulsen (matr.nr. 1344), Eiler Eysturtún (1345-46), Hákun Marstein (1347), og Andrias Reinert (1348) á Tórshavnar Býráð um fund .."har nevnda verkætlan kann vera nærri umrødd..... og.. Býráðið verður vinarliga biðið um at umhugsa málið nærri og kalla inn til fundar innan rímuliga tíð."

Fundur kom í lag, og rúgvismikið brævaskifti varð um málið í fleiri ár, uttan at nakað ítøkiligt kom burtur úr. Eisini var fundur við umboð fyri Landsverkfrøðingin.

"Kreppuárini" doyr síðan alt tos um ringveg burtur, og onkur í umsitingini, ið tosað varð við tá um málið, helt fyri nakað soleiðis: "Nei hatta dýra projektið verður hvørki ráð til, ella brúk fyri í okkara tíð !"

**2003**

Landið kom tó nógv skjótari á føtur aftur enn flest okkara høvdu væntað, og í januar 2003 sendir Tórshavnar kommuna framfýsið kunningarrit til allar borgarar við nógvum áhugaverdum tilfari.

Á síðu 8 lesa vit m.a. "Tórshavnar kommuna arbeiðir í løtuni við at gera eina 20-ára heildarætlan fyri hvussu býurin skal útbyggjast, í ætlanini verða øki løgd út til... o.s.fr...". Og hetta sær jú - í fyrstu syftu - heilt lovandi út fyri fólkið, sum býr nærhendis komandi 80-km-innkoyringini ?

Tá kagað verður undir "Ytri Ringvegur" á síðu 9 í ritinum, sæst tó einki til nakra framtíðarætlan fyri 2023, sum boðað frá á síðun 8, men harafturímóti er gamla "80-ára ætlanin" tikin upp úr aftur "mølposanum" og enn einaferð løgd á borið "ópussað".

**2023**

Nú so óføra nógv er hent síðan 80-árini, á mongum økjum, og sanniliga eisini innan ferðslu og vega/ tunnilsgerð, heita vit borgarar, sum búgva á leiðini har hendan "nútímans Høvuðsinnkoyring til Havnina" er ætlað at ganga, enn einaferð á avvarandi mynduleikar, at taka ætlanina um innkoyringarveg til Havnina upp til veruliga nýggja viðgerð, og í grundini hevur tað ikki so stóran skund at byrja her og nú.

**Góðar royndir av rundkoyringum,** er hugalig yvirskrivt á síðu 9 í frálíka kunningarritinum frá Býráðnum, har lovað verður at: **"Havnin fær fleiri rundkoyringar framyvir.** *Hesar verða hildnar at vera fragasta ferðsluloysnin tá ræður um at koma inn á høvuðsferðsluæðrarnar.* Millum annað av Hvítanesvegnum og inn á Eystara Ringveg, sum verður tann fyrsta í ár..........,av Vegnum Langa í Sundsvegin í samband við ætlaðu vegagerina tvørturum Berjabrekku og yvir í Villingardalsvegin, og frá Sundsvegnum og í Ringvegin."

***Vit, sum dagliga ferðast í hesum øki, mugu saman við Býráðnum ásanna,og gleðast um at rundkoyringin, sum í dag bindur Eystara- og Norðara Ringveg í R. C. Effersøes gøtu hevur gjørt tað til eitt spæl at ferðast í akfari á hesum í mong ár ófantaliga trupla ferðslu-øki.***

**Verða nevndu rundkoyringar gjørdar** sum fráboðað, og kemur harafturat umtalaða, stóra **góðshavnin í Kollafirði**, - ið fer at lætta munandi um tungu ferðsluna til og úr Havnini- bøtur hetta so avgerandi og munagott um ferðsluviðurskiftini í Høvuðstaðnum, at avvarandi mynduleikar hava "rættuliga langa" tíð at umhugsa projektið "Høvuðsinnkoyring til Havnina" heilt av nýggjum.

**Undirskriftir**

At stuðla hesi áheitan á avvarandi mynduleikar, eru ungfólk í økinum farin undir at savna undirsktiftir frá fólki, íð taka undir við, at tað er rætt at fáa ætlanina um **Høvuðsinnkoyring til Havnina** viðgjørda frá grundini av nýggjum.

**Andrias Reinert**
**Ásbjørn Poulsen**
**Hákun Marstein**
**Hans Joensen**
**Torbjørn Láadal**